Yvirlit yvir deyðatal, ið hevur staðist av illvøkstri í Føroyum í árunum 1955—59*)

Eftir Sonnu Dahl Niclasen.

Tilburðir av illvøkstri í Føroyum eru higartil bert skrásettir eftir deyðaváttanum. Talið á teimum, ið deyð eru av illvøkstri hvørt ár, er prentað í »Dødsårsagerne i kongeriget Danmark«, sum á hvørjum ári verður givið út av tí danska heilsustýrinum[1].

Hvussu nógv, ið til er av sjúkum, sum eru næstan 100% deyðiligar, gevur deyðatalið**) álítandi upplýsingar um. Men viðvíkjandi flestu sjúkum er hetta ikki nóg mikið; her mugu fáast hagtøl av øllum tilburðum, um álítandi yvirlit skal fáast yvir sjúkatalið hjá hvørjari einstakari sjúku.

Seinastu árini hava líkindi til at lekja summi sløg av illvøkstri verið betri enn fyrr, og tí er meira neyðugt at fáa hagtøl fyri allar tilburðir av illvøkstri, bæði til at fáa at vita, hvussu stórt sjúkatalið hjá teimum ymisku sjúkunum er, og til at kunna meta um, hvussu góð úrslit kunnu fáast av ymiskari viðgerð, og samstundis fáa yvirlit yvir, hvussu góð líkindi eru til at lekja tey ymisku sløgini av illvøkstri.

Finnast tílík hagtøl í fleiri londum so háttað, at tey kunnu samanberast, ber til at finna mun í fyrikomingini í teimum ymisku londunum; tá ið hetta verður borið saman við livi-

---

*) Landssjúkrahúsið, Tórshavn, røntgendeildin (yvirlækni: Sanna Dahl Niclasen).

**) Deyðatal verður her nýtt í týdninginum: *mortality* og sjúkatal í týdninginum: *morbidity*.

hátti og øðrum umstøðum, man tað verða gjørligt at finna fram til upprunatreytir, sum ávirka hesar sjúkur, so læknar kanska gerast førir fyri at seta í verk tiltøk, ið byrgja fyri, at hesar herviligu sjúkur nørast.

Tey seinastu árini er skráseting av illvøkstri gjørd í nógvum londum. Millumlandareglur eru gjørdar viðvíkjandi frøðiorðum og flokking av øllum illkynjaðum sjúkum av sernevnd undir *World Health Organisation*, W.H.O., til at fáa tílík hagtøl so eins sum gjørligt, so at til ber at gera álítandi sammetingar.

Ein tílík skráseting er sjálvandi lættast at fáa í lag í smáum londum, har tað ber til at hava bert eina miðstøð fyri alt landið; á henda hátt fáast best álítandi, fullfíggjað og hóskandi stór hagtøl.

Í øllum norðurlondum eru gjørd tílík miðstøðarkortsøvn til skráseting av øllum tilburðum av illvøkstri; í Danmark síðan 1942, í Noregi síðan 1952, í Finnlandi síðan 1953, í Íslandi síðan 1954 og í Svøríki síðan 1959[2].

Føroyar hava higartil ikki verið við í hesari skráseting. Einasta roynd sum gjørd er í Føroyum at savna tilfar um tilburðir av illvøkstri er gjørd av *R. K. Rasmussen* í Eiðis læknadømi[3].

Sum fyrr nevnt eru tilburðir av illvøkstri í Føroyum higartil bert skrásettir eftir deyðaváttanum, og tað er ikki nóg álítandi.

Sjúkuavgerðirnar á deyðaváttanum mugu berast saman við upplýsingar, sum annars eru til skjals um hesar sjúklingar.

Í Danmark til dømis verða sjúkuavgerðirnar á deyðaváttanum samanbornar við tær upplýsingar, sum eru at finna í illvakstraryvirlitinum (Cancerregisteret), og hetta hevur ført til ymiskar rættingar í deyðaváttanunum; á summum váttanum hevur verið skeiv staðfesting, og summar eru rættaðar frá illkynjaðum sjúkum til ikki illkynjaðar ella øvugt. Í árunum 1955 og 1956 vóru soleiðis rættingar í næstan 10% av deyðaváttanum av illvøkstri og í 1957—1959 í umleið 5%[4].

Eisini í Noregi er víst á, at hagtøl, sum einans byggja á deyðaváttanir, eru ófullfíggjað og kunnu verða villleiðandi[5].

Sum ein byrjan til álítandi skráseting av illvøkstri í Føroyum eru fyribils allar deyðaváttanir í árunum 1955—1959 kannaðar, allir tilburðir av illvøkstri eru taldir, og allar upplýsingar, sum hava verið at finna á øllum trimum sjúkrahúsum í Føroyum um hesar tilburðir, eru gjølla kannaðar.

Á 1. talvu er yvirlit yvir, hvussu nógv ið deyð eru av illvøkstri í árunum 1955—1959 í mun til øll, ið deyð eru somu ár.

1. talva.

Deyð tilsamans		Deyð av illvøkstri	Prosent	Mannfólk	Konufólk
1955	221	34	14,4	18	16
1956	232	38	16,4	17	21
1957	262	37	14,1	17	20
1958	225	37	16,4	19	18
1959	242	55	22,7	35	20
Tils.	1182	201	16,9	106	95

Til samanberingar kann verða nevnt, at í árunum 1955—1959 doyðu í Danmark tilsamans 203828 fólk, og av teimum doyðu 44956 av illvøkstri, tað er í meðal 22%, meðan talið í Føroyum hesi somu ár er 16,9%. Tað sama talið í Noregi er í meðal 18%[6], og í Íslandi 19,1%[7].

Hetta lága prosenttalið í Føroyum er kanska eitt sindur óvist, og atvoldin til tað er helst óálítandi deyðaváttanir, av tí at nógvar váttanir eru skrivaðar av líkskoðarum.

2. talva vísir talið á deyðaváttanum, sum eru skrivaðar av líkskoðarum.

2. talva.

Deyðaváttanir skrivaðar av líkskoðarum.

	1955	1956	1957	1958	1959	1955—1959
Deyðaváttanir tilsamans	51	63	55	45	48	262
Deyðaváttanir við illvøkstri á	6	5	1	2	3	17
Hin deyði kannaður á sjúkrahúsi stutt fyri deyðan	5	4	0	2	3	14

Sum tað sæst eru 262 av 1182, tað vil siga 22,2% av øllum deyðaváttanum skrivaðar av líkskoðarum.

Í Danmark eru ógviliga fáar deyðaváttanir skrivaðar av líkskoðarum; í árunum 1955—59 eru bert 0,09% av deyðaváttanum í landkommunum skrivaðar av líkskoðarum, ongar í býunum.

Síðan 1949 hevur landslæknin fingið til vegar allar upplýsingar, sum hava verið at fáa frá kommunulæknum og sjúkrahúsum um allar váttanir skrivaðar av líkskoðarum, men hóast hetta munnu tær nógvu líkskoðanarváttanir vera sera ófullfíggjaðar; tí í summum plássum hevur læknaloysi verið í fleiri tíðarskeiðum, og í summum læknadømum hava kommunulæknarnir skift tíðum.

Í 3. talvu eru deyðaatvoldirnar settar upp eftir altjóðafyriskipanini, sum sett er av W.H.O., við einstøkum broytingum á sama hátt sum danska illvakstraryvirlitið nýtir.

Á talvu 3. sæst, at 90% av øllum sjúklingum við illvøkstri hava ligið á sjúkrahúsi, (nøkur fá av hesum eru bert kannað ambulant), meðan 61,5% av teimum eru deyð á sjúkrahúsi.

Av teimum 201, sum deyð eru av illvøkstri, er sjúkuavgerðin váttað við sjóneykurannsókn av vevnaði í 133 førum ella 66,5%; av hesum er sjúkuavgerðin í 15 førum váttað við *líkskurði* (autopsi), meðan restin er váttað við skurðviðgerð ella *kykrannsókn* (biopsi) ella, í einstøkum førum av leukæmia, bert við sjóneykurannsókn av útæðrablóði.

Í 20 førum eru vit vorðin sannførd um sjúkuavgerðina bert við skurði, uttan sjóneykurannsókn; av hesum høvdu 8 illvøkstur í maganum, sum ikki bar til at skera burtur. Í 19 førum er sannføring fingin um sjúkuavgerðina bert við røntgenkannan, og helvtin av hesum høvdu eisini illvøkstur í maganum, sum heldur ikki bar til at skera burtur. Her eru soleiðis tilsamans 172, har sannføring er fingin um sjúkuavgerðina sum nevnt frammanfyri.

Av teimum 28, sum eftir eru, eru 12 váttanir um sjúklingar, sum høvdu ligið á sjúkrahúsi, stutt áðrenn teir doyðu, og sum bert vóru kannaðir við vanligum kliniskum rannsóknum. Í hesum førum kann sjúkuavgerðin av illvøkstri sigast at vera viss, meðan staðfestingin er meira óviss.

Í teimum seinastu 16 førum er sjúkuavgerðin av illvøkstri ikki viss; í 14 av hesum vóru ongar aðrar upplýsingar at finna uttan deyðaváttan, og í 2 førum kundi sjúkuavgerðin á váttanini ikki ásannast í dagbókini á sjúkrahúsi, har sjúklingurin hevði ligið, stutt áðrenn hann doyði.

Um nú verður talt upp, í hvussu nógvum førum rættingar eru gjørdar í deyðaváttanum, sæst, at av teimum 201 deyðaváttanum, sum eru kannaðar, eru 9 ella smá 5%, har sjúkuavgerðin av illvøkstri er viss, men við skeivari staðfesting. Hesar skulu allar verða nevndar:

	Sjúkuavgerðin á deyðaváttanini	*Bein sjúkuavgerð*
1.	Carcinoma renis Carcinoma prostatae seqv.	Papilloma malignum vesicae
2.	Melanosarcoma	Metastases pulm., adenoma malignum glandulae parathyreoideae
3.	Carcinoma cutis	Reticulosarcoma
4.	Carcinoma pulm. prim.	Metastases pulm. bilat. (Upphavligi tumor ikki kendur)
5.	Carcinoma oesophagei	Carcinoma ventr.
6.	Carcinoma oesophagei	Carcinoma ventr.
7.	Carcinoma coli	Carcinoma ventr.
8.	Carcinoma oesophagei	Carcinoma ventr.
9.	Carcinoma glandulae thyreoideae	Carcinoma rhinopharyngis

Síðan vóru 9 deyðaváttanir, har sjúkuavgerðin av illvøkstri stóð annaðhvørt sum hjáavgerð ella við spurnartekini; við gjøllari kannan í dagbókum kundi sjúkuavgerðin av illvøkstri avsannast, og hesar 9 deyðaváttanir eru tí ikki taldar við í skrásetingini.

Av hesum sæst, at tilsamans 18 deyðaváttanir ella 9% av øllum deyðaváttanum av illvøkstri eru rættaðar.

Aftur at hesum eru tær 16 fyrr nevndu deyðaváttanir, har sjúkuavgerðin av illvøkstri ikki er viss.

Samanlagt eru 34, ella 16% av øllum deyðaváttanum, sum hava skeivar ella óvissar upplýsingar.

Á 3. talvu sæst, at ein stórur partur av teimum sjúklingum, sum doyggja av illvøkstri í Føroyum, doyr av illvøkstri í sodningarlagnum (tractus digestorius); av teimum 106 mannfólkunum eru 57 ella 55,7% deyð av illvøkstri í sodningarlagnum, og av teimum 95 konufólkum 44 ella 46,6%.

Av teimum, sum doyggja av illvøkstri í sodningarlagnum, doyggja flest av illvøkstri í maganum, 26 mannfólk ella 24,5% og 18 konufólk ella 19%.

Av illvøkstri í lungunum doyðu fá, 7 mannfólk og 3 konufólk, av teimum 7 mannfólkunum høvdu 5 ella 4,7% upphavligan illvøkstur í lungunum, av teimum 3 konufólkunum 1 ella 1%.

Av illvøkstri í bróstinum doyðu 11 konufólk, ella 11,5%. Av illvøkstri í lívmóðurini doyðu 6 ella 6,3%.

Av tí, at áramálið er stutt, og tølini ógviliga smá, ber enn ikki til at gera nákvæmar sammetingar við tílík hagtøl í øðrum londum.

SUMMARY

The paper gives a survey of the mortality from malignant neoplasms in the Faroes during the years 1955—1959. All death certificates have been scrutinized and the diagnoses of the death certificates have been corrected after examination of all available information. The diagnoses are coded in accordance with the international classification of diseases, recommended by the World Health Organization in its revised version from 1955. Table 3 shows the results of the investigation.

BÓKMENTIR

1. Medicinalberetning for kongeriget Danmark 1955—1960.
2. *Johannes Clemmesen:* Stastical studies in malignant neoplasms.
3. *R. K. Rasmussen:* Um illvøkstur í Eiðis læknadømi 27. juni 1920—26. juni 1952, Fróðskaparrit, 3. bók 1954.
4. Dødsaarsagerne i kongeriget Danmark 1955—1959.
5 *Einar Pedersen:* Brit. Journ. of prevent. social. Medicin (1962, *16:* 105—110).
6. Sunnhetstilstanden og Medisinalforholdene i Norge 1955—1959.
7. Heilbrigðisskýrslur 1955—1959.

			All cases	Admitted in hospital		Dead on hospital	Dead at home Certificate issued by		Histologically verified		Verified only by operations	Verified only by røntgen-fot.	Verified only by clinical examination or death certificate	Autopsies		Histologically verified by autopsi	Men				Women				Sarcoma
				Number	Per cent of all cases		Physicians	Laymen	Number	Per cent of all cases				Number	Per cent of deaths		< 30	30-49	50-69	> 70	< 30	30-49	50-69	> 70	
140—145, 147—148		*Buccal cavity and pharynx*																							
140	excl. sarc.	Lip	1	1			1		1											1					
141	» »	Tongue	1	1			1		1											1					
142	» »	Salivary gland																							
143—144	» »	Mouth																							
145	» »	Tonsil (throat)																							
145.8—9, 147, 148		Pharynx, hypopharynx (and unspecified)	2	2		1	1		2											1	1				
		Lympho- and reticulosarcoma	1	1				1	1											1					1
		Other and unspecified sarcoma																							
150—159		*Digestive organs and peritoneum*																							
150	excl. sarc.	Oesophagus	10	7		4	5	1	4			4	2	1		1			2	3			1	4	
151	» »	Stomach	44	40		28	13	3	26		8	9	1	7		4		1	15	10		2	7	9	
152.0	» »	Duodenum																							
152.8—9	» »	Small intestine																							
153.0—2, 9	» »	Colon	11	11		6	4	1	6		4	1							2	5		3	1		
153.3	» »	Sigmoid colon	7	7		6	1		7					3		3			1	6					
153.8	» »	Intestinal tract, part unspecified																							
154	» »	Rectum	4	4		2	2		4											4					
155.0, 156 partly		Liver { Prim:	2	2		2			2											1				1	
		Liver { Not stated as prim:	4	4		1	3				1		3							2				2	
155.1	» »	{ Biliary passages / Ampulla of Vater	3	3		2		1	1		2											2	1		
157	» »	Pancreas	7	7		4	2	1	4		3			1		1			1	1		1	4		
158	» »	Peritoneum																							
159	» »	Unspecified digestive organs	9	4		4	4	1					9						2	1			6		
		Lympho- and reticulosarcoma																							
		Other and unspecified sarcoma	2	2		2			2					1		1	1	1							2
160—164, 146, 196.1		*Respiratory system*																							
146.160.0—1,9	excl. sarc.	Nasal cavities																							
160, 2 196, 1	» »	Maxillary sinus and jawbone																							
161—162.0	» »	Larynx and trachea																							
162.1	» »	Lung (prime)	6	6		4	2		5			1		2		1			5					1	
163	» »	Lung metastases	4	3		1	1	2	2			1	1						1	1			1	1	
		(Not stated as primary)																							
162.2	» »	Pleura	1	1		1			1										1						
164	» »	Mediastinum																							
(163 or 231)	» »	»Tumor« of lung																							
		Sarcoma Lympho- and reticulosarcoma																							
		Other and unspecified sarcoma																							
170		*Breast*																							
170	excl. sarc.	Breast	11	11		8	2	1	11					1							2	5	4		
	Sarcoma	Lympho- and reticulosarcoma																							
		Other and unspecified sarcoma																							
171—174		*Uterus*																							
171	excl. sarc.	Cervix	5	4		2	3		4				1								1	3	1		
172	» »	Corpus	1	1		1			1													1			
173	» »	Chorionepitheliom																							
174	» »	Unspecified																							
	Sarcoma	Lympho- and reticulosarcoma																							
		Other and unspecified sarcoma	1	1		1			1													1		1	
175—176		*Other female genital organs*																							
175.0	excl. sarc.	Ovary	4	4		3		1	3				1								1	3			
175.1	» »	Fallopian tube and broad ligament																							
176	» »	Vulva	1	1			1		1														1		
176.1	» »	Vagina																							
176, 8—9	» »	Other unspecified parts																							
		Sarcoma ovarii	1	1				1	1												1			1	
177—179		*Male genital organs*																							
177	excl. sarc.	Prostate	9	7		6	3		5			2	2								1	1	7		
178	» »	Testis	1	1		1			1								1								
179.0	» »	Penis																							
179.1	» »	Scrotum																							
179, 8—9	» »	Other and unspecified parts																							
	Sarcoma	Lympho- and reticulosarcoma																							
		Other and unspecified sarcoma																							
180—181		*Urinary organs*																							
180	excl. sarc.	Kidney	12	12		8	4		10		1		1								1	3	1		4	3
181.0	+ Papilloma	Bladder, carcinoma and papilloma	3	3		2	1		2		1											1	2			
181.0		Ureter and urethra																							
	Sarcoma	Lympho- and reticulosarcoma																							
		Other and unspecified sarcoma																							
190—191		*Skin*																							
190		Melanoma	1	1		1			1												1				
191	excl. sarc.	{ Other malignant neoplasms of skin / Anus																							
	Sarcoma	Lympho- and reticulosarcoma																							
		Other and unspecified sarcoma																							
193		*Brain and nervous system*																							
193.0		Brain	8	7		6	1	1	5			1	2	2				4	1		1	1	1		
193.1—9	excl. sarc.	Other parts																							
	Sarcoma	Lympho- and reticulosarcoma																							
		Other and unspecified sarcoma																							
192, 194—196		*Other organs*																							
192	excl. sarc.	Eye	1	1		1			1				1									1			
194	» »	Thyroid	3	3		2	1		3					1		1			2			1			
195.0	» »	Suprarenal gland	1	1				1	1													1			
195.2	» »	Thymus																							
196.0	» »	Bones of skull and face																							
(196.2—9)	Sarcoma	Bones and joints	1	1		1			1										1						1
		Lympho- and reticulosarcoma																							
		Other and unspecified sarcoma																							
199		*Unspecified organs*																							
199.1	excl. sarc.	Head and neck																							
199.2	» »	Thorax and pericardium																							
199.3	» »	Abdomen	2				2						2											2	
199.4	» »	Pelvis	1	1				1	1										1						
199.9	» »	Other unspecified sites	1					1					1											1	
197		*Connective tissue*																							
200—205		*Lymphatic and hæmatopoietic tissues*																							
200.0, 200.2 partly		Reticulosarcoma	2	2		2			2					1		1			1	1					
200.1, 200.2 partly		Lymphosarcoma																							
198.9, partly — 202		Other forms of lymphoma																							
201		Lymphogranulomatosis, Hodgkin	1	1		1			1									1							
203		Multiple myeloma	4	4		3	1		3				1						1	1		2			
204.0		Lymphatic leukemia	1	1			1		1											1					
204.1		Myeloid leukemia																							
204.2—4		Leukemia { acuta / unspecified }	6	6		6			6								1	1			1	1	1	1	
205		Mycosis fungoides																							
156 partly, 165, 198																									
199.6		*Metastases*																							
			201	181	90	123	60	18	134	66.5	20	19	28	20	10	13	3	10	39	54	4	9	39	43	6



Abb. 1. Oben: dorsale Aufnahme des Gehirnes von *Globicephala melaena*. *Unten:* basale Aufnahme des Gehirnes.